


# Ringir um bygdan haga



*Klokkan verður hivað uppá sítt pláss. Her skal hon kalla fólk til gudstænastur*

**Arbeiðið uppá nýggju kirkjuna í Hoyvík gongur sum tað skal. Vígsludagurin verður um slakar seks vikur, og alt talar fyri, at arbeiðið verður liðugt til ásetta dag**

KIRKJA
*Orð og myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Hoyvík:** Seinnapartin í gjár kom í øllum førum ein týðandi lutur uppá pláss, nevniliga tann gott 1 tons tunga kirkjuklokkan.

Hon er stoypt hjá einasta norska klokkustoyparí'inum Olsen Nauen Klokkestøperi í Tønsberg.

Á klokkuni standa skrivað hesi orðini eftir Gunnar Hoydal: "Um bygdan haga, vík og dal, í ljósins verki eg ljóða skal".

Í framtíðini fer henda klokkan at kalla hoyvíkingar og onnur til gudstænastur.

Í kirkjurúminum verður pláss fyri eini 400 fólkum. Verður hinvegin tørvur á enn meiri plássi, kann eitt tilhoyrandi rúm takast uppí, soleiðis at eini 600 fólk kunnu sita her.

Vígslan av kirkjuni verður sunnudagin 4. nov.



*Arbeitt verður av øllum alvi at fáa kirkjuna lidna til tíðina. Tað fer uttan iva eisini at eydnast. Her eru menn í ferð við at seta benkurnar upp*

SÍÐAN 1888
Föroya Bjór

**Frá mánadegnum 1. oktober 2007, eru upp- og afturlatingartíðir okkara soleiðis:**

KLAKKSVÍK
Øl-avgreiðslan hevur opið
mánadag - hósdag: 10-17
fríggjadag: 10-17.30

TÓRSHAVN
Øl-avgreiðslan hevur opið
mánadag - fríggjadag: 10-17.30
tó hósdag: 10-19

LEIRVÍK
Øl-avgreiðslan hevur opið
mánadag - hósdag: 10-17
fríggjadag: 10-18

SKÁLAVÍK
Øl-avgreiðslan hevur opið
mánadag - fríggjadag: 14-17.30
tó hósdag: 14-19

TVØROYRI
Øl-avgreiðslan hevur opið
mánadag - fríggjadag: 10-17.30
tó hósdag: 10-19

Klakksvíksvegur 19 Postsmoga 4 FO-710 Klakksvík
Telefon 475454 Telefax 475455 www.foroya-bjor.fo